Mentamálaráðið
MENTAMÁLADEILDIN

## DEILDARSTJÓRI TIL MENTAMÁLADEILDINA
HÆGRI ÚTBÚGVINGAR, GRANSKING OG MENTAN

**Vit søkja eftir einum dugnaligum og ágrýtnum deildarstjóra, sum vil standa fyri hesum týdningarmikla og spennandi øki.**

**Starvið:**
Í sambandi við at okkara deildarstjóri fer frá vegna aldur, er eitt áhugavert, spennandi og fjølbroytt starv sum deildarstjóri leyst at søkja á Mentamáladeildini í Mentamálaráðnum.

Høvuðsuppgávurnar hjá mentamáladeildini eru m.a. at:
- Fyrisita umsitingina av hægru útbúgvingar-, granskingar- og mentanarstovnunum
- Leggja til rættis og menna útbúgvingar, og granskingar- og mentanarstovnar á økinum
- Ráðgeva og vegleiða í spurningum innan økið, tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a.
- Samskipa virksemið við tilknýti til økið við aðrar deildir, stovnar og áhugabólkar
- Fremja samstarv millum skúlar, stovnar o.o.

Deildarstjórin er leiðari av Mentamáladeildini og hevur ábyrgd av dagligu leiðsluni, menningini av deildini og teimum útbúgvingum og stovnum, ið eru og koma á økinum. Deildarstjórin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at bygnaður/mannagongdir eru í samsvar við nútímans krøv.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjararnir hava:
- Viðkomandi útbúgving frá lærdum háskúla
- Leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum
- Góð leiðslu- og samstarvsevnir, umframt mennandi leiðslustíl
- Førleika til at menna samstarvið við vinnulívið og aðrar áhugabólkar
- Vilja til at royna nýggjar leiðir, serliga nú starvsøkið stendur fyri stórum avbjóðingum
- Áhuga fyri avbjóðingum
- Góðar málførleikar, serliga í føroyskum, norðurlendskum og enskum

**Vit bjóða:**
Mentamálaráðið mennist alsamt, og tann, ið verður settur, verður í stóran mun við til at skapa starvið.

Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir, umframt uttanlandssamstarv.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tann, ið verður settur, kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing, gransking og mentan. Mentamálaráðið arbeiðir við visjónum og hevur týðandi leiklut í visjón 2015.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður lønt í 37. lønarflokki hjá Tænastumannafelag Landsins, tó uttan at verða eitt tænastumannastarv. Lønin er í løtuni kr. 40.972,46 um mánaðin, umframt 15% í eftirløn.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um stjórnarráðini og Løgmansskrivstovuna.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skulu sendast til:

**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella mmr@mmr.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 9. juli 2007 kl. 16.00.

Starvið verður sett frá 1. september 2007 at rokna. Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra í Mentamálaráðnum, á tlf. 555051.

samsit.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Heimasíða Mentamálaráðsins er: www.mmr.fo
**Mentamáladeildin** umsitur Fróðskaparsetur Føroya, Føroya Læraraskúli, Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya, Heilsuskúli Føroya, Gransking, Føroya Fornminnissavn, Føroya Náttúrugrípasavn, Føroya Landsskjalasavn, Landsbókasavnið, Bókasøvn, Kringvarp Føroya, kirkjumál, ítróttur og annað frítíðar- og mentanarligt virksemi. Deildin samskipar eisini ES-útbúgvingar- og granskingarsamstarv. Í deildini eru 6 starvsfólk.

Vikuskiftisvaktin hjá

**SOSIALINUM & PORTALINUM**

er at hitta alt vikuskiftið á

**TELEFON 22 50 00**

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

VIVA

MIÐFLOKKURIN

*hvørt vikuskifti í Sosialinum*

- ➤ *Altjóða sinnaður*
- ➤ *Fjølbroyttur*
- ➤ *Greiður*
- ➤ *Jaligur*
- ➤ *Sterkur*

**MIÐFLOKKURIN SJÁLVANDI**



Mia av Kák Joensen

## Profilurin

**Navn:** Mia av Kák Joensen

**Aldur:** 50 ár

**Bústaður:** Sørvágur

**Familjuviðurskifti:** Gift og havi 5 børn, 3 eru gift og 2 búgva heima

Eg gangi á læraraskúla og havi 2 ár eftir. Eg brenni fyri, at at familjan skal vera eitt trygt stað fyri bæði børn og vaksin, bæði tá ið viðvíkur tað fíggjarliga og trivnaður annars. Hevur tú eitt trygt grundarstað í lívinum, ert tú betur førur fyri, at bera ta mótgongd, sum tú møtir í lívinum,

Eg stuðli Miðflokkinum, tí hann førir ein skilagóðan familjupolitikk, men fyrst og fremst, tí hann byggir á kristnu grundvirðini og vikast ikki frá teimum, tá ið ymisk mál eru fyri, har aðrir flokkar ikki eru samdir innanhýsis. Harafturat hevur Miðflokkurin ein skilagóðan politikk viðvíkjandi teimum veiku í samfelagnum – tey sum ikki sjálvi eru før fyri at gera vart við seg.

www.midflokkurin.fo